# Ráðgeving og mentoring

Vit hava øll avbjóðingar, størri og smærri. Til tíðir kunna vit uppliva at vit standa føst í støðuni og ikki skapa broytingina, sum vit ynskja skal gerast tí vit m.a. mangla yvirlitið, greiðu á bæði mál og loysn, og at síggja møguleikarnar.

Við vinnuráðgeving og mentoring fært tú í einari skipaðari tilgongd, yvirlitið og styrkina til at taka avgerandi avgerðir.

**Vanlig menningarevni**
Í einari tilgongd uppá 14 dagar - 8 mðr. kunna vit t.d. arbeiða við:

- Virkisætlan
- Nýggja strategi til tína fyritøku
- Leiðaramenning
- Persónliga menning
- Broyting í yrkisleið
- Starvsumsókn
- Setanarsamrøða

Í tilgongdini arbeiða vit miðvíst við tínum styrkjum, avbjóðingum og ætlanum til tess at fremja egin mál og mál hjá fyritøkuni.

**Fá hjálp her&nú** Ert tú í einari átroðkandi støðu, so kanst tú eisini fáa ein einkulta samrøðu og arbeiðsfund.
**Smidligar loysnir** Aftaná fyrsta fundin ber eisini til at arbeiða umvegis telefon, facetime ella skype.
**Set teg í samband við Movera/Hjørdis antin á movera@movera.fo ella á 255515 og fá meiri at vita.**
**Tú tekur avgerð um nær tú ynskir taka tína ráðgeving og mentoring.**

**Málbólkur** Mentoring og ráðgeving vendir sær til øll, bæði fólk við ymsum útbúgvingum og ymsum royndum - millumleiðarar, íverksetarar og leiðarar, sum ynskja at fremja eina broyting í sínum (arbeiðs) lívi.
**Úrtøka** Ráðgevingin gevur tær ítøkilig amboð til bæði her og nú og framyvir at skapa enn størri virði.
**Prísur**
Intro fundur kostar kr. 400 uttan mvg
60 min. kr. 870,- uttan mvg
90 min. kr. 1.095,- uttan mvg
Tilgongd 6 ferðir á 90 min. kr. 5.475 (tú sparir 1 ferð)
Tilgongd 10 ferðir á 90 min. kr. 8.760 (tú sparir 2 ferðir)
**Staður** J. Broncksgøta 40, niðara hædd th., Tórshavn

# Um títt samskifti við Movera

Tá vit arbeiða saman tryggi eg at tilgongdin er eyðkend við at vera miðvís, saklig og effektiv.

Ráðgeving og mentoring skal vera bæði gevandi og effektiv og tú fert at uppliva at virðini, so sum beinleiðis tala, viðurkenning og arbeiði, sum er væl úr hondum greitt, er grundarlagið undir tilgongdini.

Við hvørjum feti saman við Movera nærkast tú tínum máli í enn størri mun at eydnast og at skapa virði persónliga, í tínum starvi ella í tínari fyritøku.